# Tiltøk

**Gudstænastur 9. apríl**
**Christianskirkjan:** kl. 15 Hugnaløta í kirkjukjallarnum, Eilif Samuelsen greiðir frá lívi og levanaði Augstinusar. Kl. 19 Ovin Klein Olsen sigur frá nýggju fløgu síni "Aftur til lívið"

**Gudstænastur 11. apríl**
**Vesturkirkjan:** kl. 11 Bergur Debes Joensen
**Argja kirkja:** kl. 11 Derhard Jógvansson
**Norðskáli:** kl. 11 konfirmatión Emil Olsen.
**Vestmannu kirkja:** kl. 11 Henning Bøgesvang
**Havnar kirkja:** kl. 11 Ann D. Hansen
**Hoyvíkar kirkja:** kl. 11 Niels Pauli Danielsen
**Hósvík:** kl. 11 Mogens Tilsted Christensen, Afskedsgudstjeneste
**Hvalvík:** kl. 12 Mogens Tilsted Christensen, Afskedsgudstjeneste
**Miðvágur:** kl. 11 David Johannesen
**Oyndarfjørður:** kl. 12 Símun P. Jacobsen, altarg.Talvan gongur fyri missiónshúsið
**Selatrað:** kl. 17 Símun P Jacobsen
**Skála:** kl. 11 Lestur, kórið hjá Johann Mortensen luttekur
**Sjóvar kirkja:** kl. 12.10 Lestur kórið hjá Johann Mortensen luttekur
**Christianskirkjan:** kl. 11 Hanus á Gørðum altarg.
**Norðskáli:** kl. 11 konfirmatión Emil Olsen
**Gøta:** kl. 11 (konfirmatión) Martin R. Jacobsen
**Viðareiði:** Elsa Funding, dópur og konfirmation
**Hellurnar:** kl. 11 John Myllhamar
**Sandavágur:** kl. 11 altarg., deyvagudstænasta, Jónsvein Bech. Talvan gongur fyri deyvameinigheitina.
**Glyvra kirkja:** kl. 11 Barnagudstænasta, Meinhard Bjartalíð. Barnakór Glyvra kirkju syngur.
**Leiti:** kl. 12 Patrick de Neergaard, altarg.
**Tjørnuvík:** kl. 12 Inga Poulsen Dam
**Tvøroyri:** kl. 11 deknagudstænasta. Kl. 14 heilsugudstænasta við Jógvan Højgaard o. ø.
**Haldarsvík:** kl. 12 Theodor E. D. Olsen

**Konsert í Haldórsvík kirke**
Sunnudagin 11. apríl kl. 17 med »korið hjá Jóhann Mortensen«

**Gudstænastur 12. apríl**
**Gøtu kirkja:** kl. 19: Ovin Klein Olsen sigur frá nýggju fløgu síni "Aftur til lívið"

**Kirkjubøar kirkja**
Týskvøldið 13. apríl kl. 19.30 verður fyrilestur við orðum og myndum í Kirkjubøar kirkju. Asta og Bergur D. Joensen siga frá hendingum á heimsferð teirra 2007-2008 í *m.a. Nigeria, USA, Papua Nýguinea og Ísrael.* Boðið verður til drekka í Roykstovuni aftaná. Øll eru vælkomin.

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10 bíbliusøgutími fyri børn og bíbliugransking. Kl. 11 Gudstænasta, Jens V. Danielsen

**MATINÉ**
verður í Havnar kirkju leygardagin apríl kl. 11.30. Kenneth Jones, trompet og Birgitte Schnakenburg, klaver. Tey fara at spæla trompetkonsertir av Haydn og Arutjunjan.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoman yviri við Strond**
Sunnudagin kl. 18 Evangelisk møti. Øll eru vælkomin.

**KFUM og KFUK í Havn**
Mánadagur 12. apríl kl. 15 í KFUK: Seinnapartsamkoman við Niels Paula Danielsen presti. Evni: 2. Jóhannesarbræv. Týsdagin 13. apríl kl. 17 í KFUK: Várgleði fyri børn og juniorar.

**Ebenezer**
Sunnudag kl. 11 Minnismáltíð Harrans. Barnaansing er meðan møti er. Kl. 12 Eingin sunnudagsskúli. Kl. 18 Evangelisktmøti. Barnaansing er meðan møti er.

**Filadelfia Tórshavn**
Leygardagin 10. apríl kl. 21 Flare, Fríðtór Debes talar
Sunnudagin 11. apríl
Kl. 11 Morgunmøti, Tummas Jacobsen talar.

**Argir, Kirkju- og missiónshúsið**
Sunnukvøldið kl. 18 Møti v/ Hjørleif Poulsen, Klaksvík

**Lívsins Orð**
Sunnudagin kl. 10.30 Møti v/Pola Jacobsen

**Ung.livdin.fo**
Fríggjakvøldið kl. 21 á Brekku 3, Hoyvík. Hetta er GAME-NIGHT fyri ung. Leygarkvøldið ALIVE: kl. 21 í skúlanum við Løgmannabreyt. Odd Færø talar um: Men mín vinir gera tað.

**Lívdin**
Sunnudagur Familjumøtið kl. 10:30, tilbiðjanarmøti kl. 11 og lovsongur og tala kl. 12. Sunnudagsskúli og Ung-lív kl. 12. Á familjumøtinum hugleiðir Karin Olsen um "Avgerandi í mínum lívi" Tá tilbiðanarmøtið byrjar kl. 11, kunnu børnini fara í barnaansing og kreativ tiltøk. Á seinna møtinum, sum er kl. 12, heldur Jógvan Zachariassen áfram við røðini úr Rómbrævinum og verður evnið "Skulu vit akta yvirvøldina? Róm. 13:1-7". Týsdagur 13. apríl Bønarløta kl. 20 í hølunum á Brekku 3, Hoyvík.

**Missiónshúsinum við Landavegur**
Sunnukvøldið kl. 18 hava ungir strandingar møti.

**Frelsunarherurin Tórshavn**
***Tórsgøta 19***
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/sunnudagsskúla
Kl. 18 Møti v/ sjónvarpsupptøku. Loytnat Jacobina Heinese talar

**Meinigheitshúsinum í Havn**
Sunnudag kl. 14 Sunnudagsskúli. Kl. 18 Møti v/Heri Tróndheim. Øll eru vælkomin.

**Fríkirkjan Oasan** *Kirkjustræt*
Fríggjakvøldið kl. 20 after8, Sunnudagin kl. 11 Guðstænasta v/Clarisse Simonsen kl. 12 sunnudagsskúli. Mánakvøldið kl. 20 kirkjufundur. Øll vælkomin.

**Samkoman Immanuel,**
*Brekkutún 5*
Fríggjakvøldið kl. 19 Kongsins Herlið, børn 8-12 ár, øll verða koyrd heim eftir møtið. Kl. 21 Herur Jákups, ungdómsmøti. Verið hjartaliga vælkomin øll somul. Síggjast:)
Sunnudagin kl. 11.30 Barnakórið venur. Kl. 12 Møti v/sunnudagsskúla. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur undir møtinum. Verið vælkomin øll somul.

**Gongutúrur sunnudagin**
Sunnudagin 11. apríl kl. 10 verður gongutúrur: Vesturdalsá, undir Eysturoyarsillini eystarumegin til Selatraðar. Havið heit og góð gonguklæðir og ein heitan drekkamunn og matpakka við. Tilmelding á tlf. 302425 ella torsinfo@torshavn.fo

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Sunnudagin kl. 11 familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, Rigmor & John Fonsdal tala. Mánakvøldið kl. 20 lovsangs- og bønarløta. www.gospel.fo

**Samkoman Marknagil Fjalsgøta 2, Tórshavn**
Sunnudagin kl. 10.30 Breyðbróting. Sunnudagsskúli kl. 12. Evangeliskt møti kl. 18 Mánakvøldið kl. 20 Bønar/ uppbyggingarmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin

**Sjómanskvinnuringurin í Havn**
Vit koma saman á hotel Tórshavn mánakvøldið kl. 19.30.

**Filadelfia Vágar**
Sunnudagin kl. 11 Møti við Heðin Lamhauge. Sunnudagsskúlin verður kl. 11.30. Øll eru vælkomin.

**Kedron, Vágar**
Møtir og tiltøk hjá samkomuni eru at síggja á heimasíðu okkara. www.kedron.fo.

**Miðvágs Missiónshús**
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli. Kl. 18 verður felagsmøti í meinigheitshúsinum í Sandavági. Hjartaliga vælkomin.

**Sørvágs missiónshús**
Sunnudagin kl. 17: Ovin Klein Olsen sigur frá nýggju fløgu síni "Aftur til lívið"

**Aglow Sandoy**
Møti verður í Samljóð Skopun mánadagin kl. 19. Vitjan av landsleiðsluni. Tosað verður um tær ymisku uppgávurnar í Aglow og um 25 ára stevnuna í mei. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Missiónshúsið í Skopun**
Missiónsvikan verður í døgunum 15.-18. apríl. Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli. Kl. 18 møti v/Absalon Matras og Egil Joensen. Øll eru vælkomin.

**Glæman Kvívík**
Sunnukvøldið kl. 17 møti v/John S. Myllhamar

**Kollafjarðar Missiónshús**
Leygarkvøldið kl. 19: Ovin Klein Olsen sigur frá nýggju fløgu síni "Aftur til lívið" Sunnudagsskúli verður sunnudagin kl. 14 og møti kl. 18. Bíbiltími verður týskvøldið kl. 20 v/ Jógvan Garðsá Øll eru hjartaliga vælkomin

**Hvalvíkar missiónshús**
Møtið verður sunnudagin kl. 18. Luttøka úr Leirvík. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Kambsdalur, Handilsskúlin**
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting. Týskvøldið kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.

**Frá Eysturoyar Gongufelag**
Sunnudagin ganga vit Elduvík – Funningsfjørður. Greitt verður frá um bygdini Elduvík. Túrurin er lættur umleið 3 tímar. Vit møtast við bátahylin í Funningsfirði kl. 14.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 Awake við Dánjal Petersen úr Lívdini. Sunnudagin kl. 17, Møti við ymiskari luttøku. Barnamøti kl. 17. (Nátturði aftaná møti)

**Bygdalegan fyri Skála og Skálafirði**
verður í Leguhúsinum í Nesvík. Vikuskifti 9-11 apríl. Aðrar familiur sum hava tilknýti til bygdirnar eru vælkomin at vera við. Tekning fer fram hjá Jóhannu á tlf 270293.

**Meinigheitshúsið á Skála**
Sunnudagin verður eingin Sunnudagsskúli vegna bygdalegu í Nesvík. Sunnukvøldið kl. 19 møtið við Jógvan Fríðriksson. Øll eru hjartaliga vælkomin. Sjómanskvinnuringurin hevur alment kvøld, við burturluting mikukvøldið kl. 19.30. Sverri Kass leggur fyri. Øll vælkomin.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Fríggjakvøldið kl. 21 Ungdómsmøti v/Romain Zannou
Sunnudagin kl. 17 Møti v/ Ólavur Øre Hansen Sunnudagsskúli í kjallarinum Um tær manglar fart, so ring á tlf. 447090 ella 775091

**Karmel, Eiði**
Sunnukvøldið kl. 19 Møti við Silas K.K. Olofson

**Thabor, Fuglafjørður**
Leygardagin kl. 10 Bíbliutími v. Ragnar Petersen, evni: Kann meinigheitin liva av fastfood. 1. kor. 3. Byrja verður kl. 9.30 við morgummati. Sunnudagin kl. 18 Møti v. Kristian Martin Petersen. Øll eru vælkomin.

**Stranda Missiónshús**
Sunnukvøldið kl. 18 Møti v/Sólbjørg Símunarson, evni: sangir hjá Johannes Mortensen. Leggið til merkis at sunnukvøldsmøtini eru broytt til kl. 18.

**KFUM & K í Klaksvík**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. kl. 17.30 Bønarløta kl. 18 Møti við Marian Nielsen. kl. 21 Ungdómsmøti.

**Soli deo Gloria**
Sunnukvøldið kl. 18 møti v/ Fimmboga Poulsen og Jógvan Jacobsen. Tú ert vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Týskvøldið kl. 20 bíbliutími og bønarløta.

**Frelsunarherurin Vágur**
Sunnudagin kl. 11 sunnudagsskúli/morgunmøti. Kl. 18 møti v/ Niels Edvard Olsen. Mánakvøldið kl. 20 bønarløta

**Sandvík**
Sunnukvøldið kl. 18 verður verður í kirkjuni við Jógvan Højgaard

**Sion í Vági**
Sunnudagin kl. 11 og kl. 18 verður møti. David Bech talar og Johannus Nielsen syngur.

**Tilhaldið í Tórsgøtu**
*Tlf: 316491/286491*
*tilhald@torshavn.fo*
*Opið er mánadag til hósdag kl. 09-17 og fríggjadag kl. 09-16. Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.*
**OBS!!!** Temadagur í maskinbinding 13. apríl kl. 9-16. Tilmelding: 316491. Fríggjadagin Kl. 14-16 Prát.

**Pensionistafelagið í Havn**
Limirnir koma saman í Losjuni, Tinghúsvegur 18, mikukvøld kl. 19, tá ikki annað er lýst. Telefon: 222733 finnurj@post.olivant.fo
Mikukvøldið 14. apríl kl. 19. Havnarmaður sigur frá í Losjuni.

**Eldrafelagið Kumlá á Skála**
hevur hugnakvøld týskvøldið 13. apríl kl. 19.

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
*hevur opið mánadag og mikudag frá kl. 13 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Øll eru hjartaliga vælkomin.*
Mánadagin 12. apríl. Boccia í kjallaranum.
Mikudagin 14. apríl Prát og hugni.

**Dagtilhaldið í Gøtubrá**
Opið týs- og hósdag kl. 15-18

---

**70 ára føðingardagur**
Leygardagin 24. apríl verður Solveig Nolsøe Johansen 70 ár. Opið hús verður leygardagin 24. apríl í Jómsborg frá kl. 14 til kl 18. Øll eru vælkomin.

**80 ára føðingardagur**
Tann 19. apríl fyllir Merry Bertholdsen í Vági, 80 ár. Tey sum vilja hátíðarhalda dagin saman við henni, eru vælkomin í Billiardhúsið, har dagurin verður hildin leygarkvøldið 24. apríl kl. 19

**95 ára føðingardagur**
Leygardagin 17. apríl fyllir Amanda Joensen, Vatnsoyrar 95 ár. Tey ið ynskja at gleða hana eru vælkomin á Hotel Vágar millum kl. 15.30 og kl. 18. Um kvøldið verður hon saman við familjuni.

**Gullbrúdleyp**
Leygardagin 17. apríl hava Helga og Jørgin Gleðisheygg Nes, Gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í bygdahúsinum í Leirvík, kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin. Tey ið vilja gleða okkum við at koma verða biðin um at siga frá innan 8. apríl á tlf. 447160 ella 270876

**Brúdleyp**
Leygardagin 10. apríl giftast Jóna Johannessen, Tórshavn og Rúni Hvannastein, Kaldbak. Vígslan verður kl. 13 í Býráðsalinum í Havn. Veitslan fyri innbodnum verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.

**Brúdleyp**
Leygardagin 24. apríl giftast Joan Simonsen, Saltangará og Rúni Jallson Niclassen, Skáli. Vígslan verður í Glyvra kirkju kl. 14. Veitslan verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19. Tey, ið ynskja at gleða Brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at tekna seg innan 10. apríl á tlf. 262713, 448051 (Joan) ella 256043, 441603 (Rúni).

**Brúdleyp**
Leygardagin 1. mai giftast Linda Kjeld, Tórshavn og Jákup Eli Joensen, Oyrabakki. Vígslan verður kl. 12 í Havnar Kirkju. Døgurðin verður saman við familjuni. Síðan verður veistlan í Bygdarhúsinum í Kollafirði kl. 19, og øll eru vælkomin.

**Brúdleyp**
Leygardagin 1. mai giftast Dania Berthelsen og Svein Thomsen, Strendur. Vígslan verður í Sjóvar kirkju kl. 11. Døgurði verður fyri innbodnum kl. 15. Frá kl. 19 verður opið hús í Bygdahúsinum á Strondum, har øll eru hjartaliga vælkomin at gleðast saman við brúðarparinum. Vinarliga Dania & Svein.